## Tunnil til Gjáar

Eitt uppskot frá Tjóðveldisflokkinum um at játta pening til kanningar í sambandi við ein tunnil millum Funning og Gjógv fekk yvirhøvur góða móttøku frá hinum flokkunum. Fleiri tingmenn vístu á, hvussu ofta vegasambandið til Gjáar er darvað av kava um veturin, og at bygdin harafturat hevur vinnuvirkir, sum hava tørv á betri sambandi. Eftir uppskotinum skulu 300.000 krónur brúkast til at kanna, hvar tunnil kann gerast.

## Útstykking liðug

Leirvíkar kommuna hevur nú yvirtikið útstykkingina, sum partafelagið Byggitek hevur gjørt í Nýggjagerði. Í útstykkingini eru tólv grundstykki, og tey eru øll seld. Tað er klárt hjá eigarunum at fara undir at byggja, og seinni er ætlanin at hampa og asfaltera økið. Kommunan skrivar á heimasíðuni, at tað er framvegis bíðilisti eftir grundstykkjum, og í løtuni arbeiðir bygdarráðið við at keypa lendi í Fløtugerði til at stykkja út.

# »Røkke & Co sparker 200«




*Norska fiskivinnublaðið Fiskaren skrivar í hesi vikuni um avgerðina hjá P/F Nærabergi at taka Atlantic Navigator úr Føroyum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Við at umbyggja Atlantic Navigator kemur framleiðslan av krill-olju hjá Aker BioMarine í Suðurískhavinum fyrr upp á tey 500 tonsini, sum er málið tey næstu árini**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Norska fiskivinnublaðið Fiskaren hevur í vikuni grein um, at Atlantic Navigator fer at gevast í Føroyum til heystar.

Á forsíðu blaðsins er yvirskriftin »Røkke & Co sparker 200 på Færøyene« og í undiryvirskriftini verður lagt aftrat, at »Kjell Inge Røkke og de andre eierne av giganttråleren Atlantic Navigator har sagt opp mannskapet på 200 mann«.

Í greinini verður tíðindabrævið endurgivið, sum Hanus Hansen, stjóri í P/F Nærabergi, sendi fjølmiðlunum fyrr í vikuni.

- Høvuðsorsøkin til avgerðina er tann ótryggleiki, sum valdar í føroysku fiskivinnuni í sambandi við nýggju fiskivinnulógirnar, sum ætlanin er at fremja í Føroyum.

Tað er hesin ótryggleiki sum ger, at »satsingin« hjá Aker BioMarine í Føroyum, sum eigur 33% av surimi-verkætlanini, gerst truplari.

Í greinini í Fiskaren verður eisini víst á, at samstarvið millum JFK og Føroyagrunnin øðrumegin og Aker BioMarine hinumegin fer at halda fram í P/F Nærabergi, og í løtuni verður mett um, hvussu hetta samstarv skal verða í framtíðini.

JFK og Norðoyagrunnurin eiga 67% av P/F Nærabergi og Aker BioMarine 33%.

### Dýr umbygging

Aker BioMarine fer at yvirtaka Atlantic Navigator, sum verður umbygdur til veiði eftir krill og framleiðslu av krill-olju í Suðurískhavinum.

Íløgan í nýggju verkætlanina hjá Aker BioMarine verður um hálva miljard, men við at umbyggja Atlantic Navigator, kemur verkætlanin í Suðurískhavinum fyrr í gongd.

Norðmenn halda, at íløgan, sum nú skal gerast í Atlantic Navigator, er umleið helmingurin av tí, sum eitt nýtt skip til hesa veiði og framleiðslu annars hevði kostað felagnum. Tí verður váðin eisini minni, um alt ikki skuldi gingið væl í Suðurískhavinum.

Tá ið umbyggingin verður liðug í 2009, fer Atlantic Navigator at avloysa skipið »Saga Sea«.

- Á henda hátt kunnu vit koma upp á tey 500 tonsini av krill-olju eitt ár fyrr enn væntað, sigur Helge Midttun, deildarleiðari hjá Aker BioMarine við Fiskaren.

# Politisku signalini søkt

**- Tað er í lagi, at broytingar verða framdar á fiskivinnuøkinum, har slíkar eru neyðugar, men vit halda, at friður eisini má valda, soleiðis at menn, sum reka vinnu, vita, hvat teir hava at halda seg til. Tað er eingin loyna, at stórt órógv er í vinnuni í løtuni, nú so nógvir »bóltar« eru í luftini í senn, sigur Jákup Sólstein**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Hann prýðir forsíðuna í føroyska Skipalistanum í ár, og hann hevur prýtt føroyska fiskiskipaflotan seinasta árið sum avloysari hjá Nærabergi, sum fór úr flotanum. Skipið hevur verið okkara stoltleiki, og vit hava kunnað sagt, at hann telist millum størstu skip í Norðuratlantshavi. Eitt skúlaskip hjá mongum føroyskum ungdómi, sum valdi at søkja sjógvin. Men nú alt sá betri út við nógv størri framleiðsluorku og einum munandi betri skipi – og vit bíðaðu eftir, at reiðaríið fór at fortelja okkum, at nú hekk verkætlanin saman, bórust óvæntaðu tíðindini:

»Atlantic Navigator gevst í Føroyum«.

### Harmur formaður

Ein av teimum, sum er ógvuliga harmur um, at Atlantic Navigator gevst til heystar, er formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, sum sjálvur starvast á skrivstovuni hjá JFK-Troli í Klaksvík.

Í vikuni hevur Føroya Reiðarafelag fundast um nýggju fiskivinnulógirnar, sum eru lagdar fyri løgtingið – og tær, sum enn bara eru í stoypiskeiðini.

Jákup Sólstein hevur ikki hug at siga nakað serligt um fundin, tí ætlanin er at hava fleiri fundir um ætlaðu broytingarnar.

- Í komandi viku fara vit at tosa við onnur feløg, eitt nú felagið Trolskip, felagið Línubátar og Føroya Ráfiskakeyparafelag um viðurskiftini.

Hann sigur, at Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hevur kallað Føroya Reiðarafelag til fundar av umrøða viðurskiftini, men fundur verður ikki við landsstýrismannin, fyrr enn feløgini saman hava umrøtt viðurskiftini.

- Feløg hittast til innanhýsis fundar týsdagin, og síðan er ætlanin at hava ein felagsfund mikudagin, sigur Jákup Sólstein.

Hann heldur, at fundurin við landsstýrismannin tí í fyrsta lagi verður mikudagin ella hósdagin.

### Órógvandi signal

- Í uppskotinum hjá landsstýrinum, sum nú liggur í vinnunevndini, er eitt nú talan um, at einki felag kann eiga meira enn 20% av einum fiskaslagi í einum skipabólki.

Hann vísir á, at landsstýrið eisini hevur aðrar broytingar í stoypiskeiðini á fiskivinnuøkinum, og hesar hava eitt nú verið til ummælis í fiskivinnuráðnum.

- Í málinum, sum enn ikki er lagt fyri tingið, er eitt nú ætlaða broytingin um tíðaravmarking av rættindum til veiðiloyvini, har hesi skulu kunna sigast upp og seljast útaftur.

Jákup Sólstein heldur, at ov lítið gjøgnumskygni er í hesum uppskotum, sum ilt er at meta um avleiðingarnar av, um tey verða sett í verk.

- Tað er í lagi, at broytingar verða framdar á fiskivinnuøkinum, har slíkar eru neyðugar, men vit halda, at friður eisini má valda, soleiðis at menn, sum reka vinnu, vita, hvat teir hava at halda seg til. Tað er eingin loyna, at stórt órógv er í vinnuni í løtuni,

